Trípartaavtala millum

Føroya landsstýri

og

Føroya Arbeiðsgevarafelag/Føroyar Handverksmeistarafelag

og

Landsfelag Handverkaranna/Føroya Handverkarafelag/Starvsmannafelagið/S&K-felagið

Í Føroyum hava vit ikki havt siðvenju um trípartasamráðingar ímillum partarnar, ið varða av arbeiðsmarknaðinum. Í samgonguskjalinum frá 2015 stendur: "Trípartasamstarv skal á ávísum økjum styrkja arbeiðsmarknaðin" – umframt at – "ætlan verður løgd fyri lærlingaøkið". Partarnir á arbeiðsmarknaðinum hava eisini eftirlýst hesum.

Vinnan hevur javnan heitt á myndugleikarnar um at føra ein konjunkturjavnandi politikk. Tað er ein sannroynd, at konjunkturjavnandi politikkur umframt at gera virksemið í landinum javnari eisini hevur gagnligt árin á lærlingatilgongdina. Konjunkturjavnandi politikkur er eitt mál í samgonguskjalinum hjá hesari samgonguni. Hendan semjan byggir á trípartasamráðingar, ein konjunkturjavnandi politikk og eina endurskoðaða og betri lærlingaskipan.

Trípartasamráðingarnar hava tikið støði í tilmælinum um tillagingar ísv. endurskoðan av yrkisútbúgvingarøkinum, sum Yrkisútbúgvingarráðið lat landsstýrinum tann 12. september 2018[1].

Trípartasemjan um yrkisútbúgvingarøkið millum landsstýrið, arbeiðsgevarar og fakfeløgini er eitt tiltrongt frambrot á økinum. Tað er at fegnast um, at tað nú hevur eydnast hesum trimum pørtum at røkka einari semju.

Í okkara grannalondum er vanligt at brúka trípartasamráðingar á ymiskum stórum økjum, ið fevna breitt, og sum hava stórar broytingar við sær.

Skal føroyski arbeiðsmarknaðurin framhaldandi mennast, er neyðugt, at politiska skipanin, arbeiðsgevarar og fakfeløg tosa saman og semjast um mál, ið hava felags áhuga. Partarnir eru samdir um, at hetta eigur at verða leisturin, arbeitt verður eftir, tá arbeiðsmarknaðarlóggáva skal gerast ella tillagast. Tí er at vóna, at henda trípartasemjan um yrkisútbúgvingarøkið millum landsstýrið, arbeiðsgevarar og fakfeløgini fer at leggja lunnar undir fleiri samstørv á øðrum økjum.

Eitt mál, ið allir partar hava í felag, er, at gera føroysku arbeiðsmegina til reiðar at møta mongu nútíðar og framtíðar avbjóðingunum.

[1] Sí fylgiskjal 1

Hendan avtalan inniheldur semjur um:

- Inngangur: trípartasemja
- Støðugari lærlingatilgongd yvir ár
- Nýggj og betri lærlingaskipan
- Næmingar uttan sáttmála og við avbjóðingum
- EUX
- Merkantilu útbúgvingarnar endurskoðaðar og tillagaðar tørvinum á arbeiðsmarknaðinum
- Fleiri læru- og praktikkpláss innan tað almenna
- Viðlíkahald av landsins ognum sum liður í at fáa eitt støðugari lærlingatal
- Heimildarlóg um konjunkturjavnandi uppraðfesting av landsvegahaldi og umvæling av landsins bygningum
- Útbjóðing av almennum arbeiðum setur krøv til fyritøkur um at útbúgva til vinnuna
- Lønarútgjaldið til meistarar ísv. skúlagongd hjá lærlingum gerast konjunkturtengt
- Arbeiðsgevarar stovna lærlingaráð
- Felags kunning, vegleiðing og marknaðarføring av yrkisútbúgvingum
- Forum fyri støðugari lærlingatali
- Trípartasamstarv frameftir

Støðugari lærlingatilgongd yvir ár

Semjan byggir á, at almenni og privati arbeiðsmarknaðurin í felag lyfta byrðina at útbúgva nóg nógv yrkislærd. Úrslitið er, at vit útbúgva nóg nógvar borgarar til ein arbeiðsmarknað, ið støðugt er í broyting. Fyri almenna myndugleikan merkir semjan fyrst og fremst, at til ber at veita ungum støðugar og fjølbroyttar útbúgvingarmøguleikar, sama um samfelagið er í há- ella lágkonjunkturi. Ein avbjóðing er, at í lágkonjunkturi fækkar talið av læruplássum, og tá gerst tað truplari at nema sær eina yrkisútbúgving. Hendan semjan miðar ímóti, at almenni og privati arbeiðsmarknaðurin í felag arbeiða fram í móti at loysa hesa avbjóðing.

Við hesari semjuni verður arbeitt við einum konjunkturjavnandi samstarvi í millum almennar myndugleikar og arbeiðsmarknaðin, sum tryggjar eina støðugari tilgongd av lærlingum yvir ár. Hetta fer at gera yrkisútbúgvingartilboðið støðugari, yrkisútbúgvingarskipanina lættari at umsita og góðskustøði á útbúgvingunum støðugari.

Semjan er grundarlagið undir einari styrktari lærlingaskipan, har dentur verður lagdur á ta góðu veksliskipan í millum skúla og meistaralæru, sum vit kenna hana í dag. Hetta fer at gagna næmingum, lærlingum, undirvísarum, skúlum, arbeiðsgevarum og myndugleikum.

Málið við semjuni er at tryggja, at lærlingatalið ikki fer undir 250 nýggjar lærlingar hvørt ár, sum er fortreytin fyri at hava eina reina lærlingaskipan. Tískil er neyðugt, at myndugleikar og privati arbeiðsmarknaðurin í felag gera serlig átøk at tryggja, at hetta ikki hendur.

1. Nýggj og betri lærlingaskipan

Verandi lærlingaskipan

Í dag fylgja lærlingar og næmingar uttan sáttmála somu skúlaskeiðum. Hetta er í lagi á Yrkisnámi 1, men á Yrkisnámi 2 hava lærlingar, sum í miðal eru 25 ára gamlir, tá ið teir fara undir at læra, verið úti á læruplássinum í upp til eitt ár og koma aftur á skúlabonk saman við ungum, sum ikki hava verið úti og arbeitt. Hetta er til ampa fyri bæði næmingin, sum er verri fyri fakliga enn lærlingurin, og fyri lærlingin, sum skal í gjøgnum eina skúlagongd á einum støði, sum er ov lágt.

Fyri arbeiðsgevaran merkja drúgvu skúlaskeiðini, at tað er torført at leggja uppgávurnar til rættis, tí partur av arbeiðsmegini er burtur í langa tíð. Tað er eisini ein meinbogi, at upptøkan á Yrkisnámi 1 og 2 bert er eina ferð árliga, í august mánaði. Hevur ein arbeiðsgevari nógvar lærlingar, skulu teir allir í skúla samstundis uttan mun til, hvussu leingi lærlingurin hevur lært, og hetta darvar planleggingini á arbeiðsplássunum.

Nýggja lærlingaskipanin

Hendan semjan hevur við sær, at til ber at laga lærlingaskipanina til, so hon burtur av verður ein lærlingaskipan, eftir at Yrkisnám 1 er lokið. Nýggja skipanin fer at gera tað smidligari hjá læruplássunum at taka fleiri lærlingar.

Nógvir lærlingar velja at gevast. Skúlarnir meta, at ein orsøk kann vera, at nógvir næmingar ikki kenna nógv til yrkisleiðina, áðrenn teir søkja lærupláss. Fyrr lærdu nógv ung okkurt handverki heima, meðan tað í dag eru færri og færri ung, sum hava nakað tilknýti til tað handverksliga. Fleiri ung velja eina yrkisútbúgving, longu tá ið tey koma úr fólkaskúlanum. Teirra val byggir á, at tey vita, at tey ikki vilja fara gymnasiala vegin - tó uttan at tey hava sett seg inn í yrkisútbúgvingarnar. Hóast avmarkaða vitan um yrkisútbúgvingina, verður kravt av teimum, sum vilja hava eina yrkisútbúgving, at tey skulu velja sær yrki, áðrenn tey fara í læru/skúla. Tað fer bæði at styrkja um kunnleikan til ymisku yrkisleiðirnar og styrkja grundarlagið, tá ið yrkisvalið skal gerast, um tey ungu fáa eitt støðishálvár, har tey hava møguleika at royna ymisk yrki eitt tíðarskeið. Tað verður mett, at eitt støðishálvár fer at minka um fráfallið, sum stendst av manglandi innliti í yrkini.

Eitt slíkt hálvt støðisár gevur teimum ungu førning – ikki minst nú tá ið handverk eftir 6. flokk ikki longur er partur av flestu fólkaskúlunum, eins og nógv heim onki tilknýti hava til handverk.

Ágóðin av nýggju skipanini

Sum liður í at nýskipa lærlingarskipanina, verða hesi viðurskifti broytt:

- Eitt støðishálvár verður stovnað til teirra, sum ikki hava sáttmála, har tey ungu hava møguleika til at royna trý yrki, áðrenn tey, um tey velja at halda fram á eini yrkisleið, velja yrki endaliga. Eftir at hava lokið støðishálvárið ber til at halda fram til Yrkisnám 1. Eftir at hava lokið Yrkisnám 1 slepst ikki víðari í skúlaskipanini uttan sáttmála.
- Longdin av skúlaskeiðum eftir Yrkisnám 1 verður tillagað einstøku yrkini. Hetta gera vinna og skúli í felag.
- Yrkini skulu hava egna námsætlan, sum allar eiga at verða gjørdar av nýggjum og lagaðar til einstøku yrkini.
- Farið verður frá F og E stigi í almennu fakunum upp á D stig við møguleika fyri at velja C stig. Almennu fakini skulu yrkisrættast, eins og endurskoðað verður, um fakini eru júst tey røttu. Førleikamálini í almennu fakunum skulu endurspegla yrkið, tey hoyra til. Yrkisútbúgvingarráðið og Mentamálaráðið taka stig til, at arbeiðið við námsætlanum og lesiætlanum verður gjørt av skúla og fakfólki í felag.
- Upptøka til yrkisnám verður tvær ferðir árliga, í tann mun næmingagrundarlagið uppfyllir treytirnar til minstamark á flokkum.

Tryggjast skal, at góðskan og støðið á lærlingaútbúgvingini ikki lækkar, sum úrslit av teimum broytingunum, sum mælt verður til. Krøvini til føroysk sveinabrøv skulu lúka somu treytir sum krøvini til sveinabrøv í okkara grannalondum.

2. Næmingar uttan sáttmála og við avbjóðingum

Í sambandi við, at nýggj lærlingaskipan verður gjørd, fara at verða næmingar, sum fella uttan fyri nýggju skipanina. Tá tilmælið varð gjørt, bleiv eisini staðfest, at í dag er ein bólkur í skúlaskipanini, sum fellir uttan fyri verandi tilboð í útbúgvingarskipanini.

Ein arbeiðsbólkur verður settur við umboðum frá Almannamálaráðnum, skúlamyndugleikunum og skúlunum (TSK, Glasir, Kambsdalur) og vinnuni, sum skal arbeiða við at eyðmerkja hendan bólkin, ið fellir uttan fyri tilboðini í verandi skúlaskipan. Eisini skal bólkurin koma við uppskotum um tilboð, sum áttu at verið sett í verk, so hesin bólkur fær hóskandi útbúgvingarmøguleikar.

Bólkurin fer til verka 15. august 2019 og skal verða liðugur við sítt arbeiði 15. desember 2019.

3. EUX

EUX er ein útbúgving, sum bæði er handalig og gymnasial. Tað vil siga, at lærlingur eftir lokna útbúgving hevur eitt sveinabræv innan handverk og eitt gymnasialt prógv, ið svarar til eitt HF prógv (fyrireikingarbreyt).

Hendan samansetingin letur upp fyri fleiri møguleikum enn verandi lærlingaskipan. Lærlingurin kann eftir lokna útbúgving arbeiða sum sveinur í vinnuni ella søkja inn á hægri lærustovnar til víðari lestur so sum verkfrøði, maskinmeistara, arkitekt o.a.

Kravið til ein EUX lærling er rættiliga stórt, tí útbúgvingin krevur, at lærlingurin er sera væl fyri í bókligum lærugreinum, eins og handaligu evnini skulu vera góð.

Tey seinastu árini hava fleiri dømi verið um, at næmingar velja at taka eina yrkisútbúgving eftir lokna miðnámsútbúgving og øvugt. Tá EUX er ein samanseting av einari yrkisútbúgving og einari gymnasialari útbúgving, er málbólkurin m.a. hesi. Ein EUX útbúgving tekur í millum 4 ár og 9 mánaðir, og 5 ár. Skúlagongdin er 100 vikur, og tíðin á læruplássinum er í millum 127 vikur og 133 vikur, sum er longdin á lærutíðini í flestu verandi yrkisútbúgvingum.

Ein EUX flokkur innan el, timbur, maskin, smið og bil verður royndarkoyrdur.

Upptøkan til EUX verður umvegis umsóknarblaðið til miðnám eins og til yrkisútbúgvingar í dag fyri tey, ið ikki hava sáttmála. Upptøkunevndvið umboðum frá vinnu og skúla verður sett. Upptøkan fer fram eftir at umsóknarfreistin til miðnám er lokin. Upptøkuleisturin verður fylgjandi:

- Upptøkunevndin hyggur at prótvølum úr 9./10. flokki.
- Upptøkunevndin hevur samrøðu við umsøkjarar við skikkaðum prógvum.
- Upptøkunevnd tekur út frá eini heildarmeting skikkaðar umsøkjarar upp, og teir undirskriva sáttmála við lærupláss. T.v.s., at upptiknir umsøkjarar hava lærupláss, áðrenn summarfrítíðin byrjar.
- Royndartíðin fyri lærling og lærupláss er 6 mánaðir eins og í dag.

EUX verður boðið út á vári 2020.

4. Merkantilu útbúgvingarnar endurskoðaðar og tillagaðar tørvinum á arbeiðsmarknaðinum

Í fleiri ár hevur møguleikin at taka skúlagongdina á yrkisútbúgvingarstigi innan almenna fyrisiting í Føroyum verið eftirspurdur. Í verandi støðu senda almennir stovnar sínar lærlingar til Danmarkar, og lærumeistarar

hava víst á, at innihaldið á donsku skúlaútbúgvingunum í stóran mun ikki gongur føroyska tørvinum á møti. Tí verður sett á stovn ein útbúgving, har føroysk viðurskifti fylla mest.

Tilgongdin til merkantilu útbúgvingarnar, sum í vavi hava umleið ein triðing av samlaðu lærlingatilgongdini hvørt ár, hevur í nøkur ár havt ymiskar avbjóðingar. Eitt nú hevur tilgongdin til onkrar útbúgvingar verið fallandi, og fyritøkur hava havt trupult við at fáa nóg nógvar lærlingar. Málið við at endurskoða merkantilu yrkisútbúgvingarnar er at fáa innihaldið til at samsvara tørvinum hjá vinnuni, eins og at gera tær meira lokkandi og viðkomandi hjá ungum og harvið røkka nýggjum málbólkum, sum tær møguliga ikki gera í dag.

Sum eitt úrslit av endurskoðanararbeiðinum, sum varð handað landsstýriskvinnuni seinasta heyst, varð ein arbeiðsbólkur settur við umboðum frá vinnuni, fakfeløgum og skúlum at gera ítøkilig tilmæli til landsstýriskvinnuna, um hvørjar tillagingar av merkantilu útbúgvingunum tørvur er á. Arbeiðið er komið væl áleiðis, og tilmæli verður handað landsstýriskvinnuni 15. juli 2019.

Endurskoðaðu útbúgvingarnar verða bodnar út á vári 2020.

5. Fleiri læru- og praktikkpláss innan tað almenna

Bæði almenni og privati arbeiðsmarknaðurin hava ábyrgdina av at halda eitt støðugt høgt lærlingatal.

Tað almenna kann hava lærlingar í ymiskum yrkjum, har tað mest vanliga er skrivstovulæra í almennari umsiting. Har afturat útbýr tað almenna føðsluatstøðingar (assistentar) og føðsluhjálparar, sum einamest verða útbúnir til almenna geiran at arbeiða á dagstovnum, ellisheimum, sjúkrahúsum o.s.fr. Aðrar útbúgvingar eru eisini møguligar innan almenna geiran.

Á sama hátt, sum privati geirin ger semju, sum stuðlar undir eitt støðugari lærlingatal, ger almenni geirin semju um eitt lærlingatal á økjum, har tað almenna er við til at útbúgva yrkislærd.

Greinað verður, á hvørjum økjum tað almenna kann útbúgva lærlingar, og síðani verður eitt lærlingatal ásett. Tað almenna ásetir mál fyri, hvussu nógvir lærlingar skulu útbúgvast sum føðsluatstøðingar, føðsluhjálparar, kt-supportarar, skrivstovufólk, o.s.fr.

6. Viðlikahald av landsins ognum sum liður í at fáa eitt støðugari lærlingatal

Tað er ymiskt, hvussu arbeiðskrevjandi ymsar íløgur hjá tí almenna eru, men kortini fylgjast samlaðu íløgurnar hjá tí almenna og tilgongdin av nýggjum lærlingum rættiliga neyvt. Hetta er lýst í frágreiðingini frá Yrkisútbúgvingarráðnum, sum er viðheft sum fylgiskjal 1.

Ein útgreining av sveiggjunum í tilgongdini av nýggjum lærlingum vísir, at øll fakøkini sveiggja lutfalsliga at kalla líka nógv og eisini, at sveiggini fylgjast rættiliga væl í tíð. Sostatt eru sveiggini ikki avmarkað til ávís fak, og eiga átøk at útjavna virksemið at raka breitt.

Partarnir ásanna, at viðlíkahald er skjótari hjá landinum at seta í verk enn ný- og umbygging. Harumframt krevur viðlíkahald lutfalsliga meira arbeiðsmegi í mun til kostnað, enn ný- og umbygging ger.

Partarnir eru tí samdir um, at landið skal serliga uppraðfesta viðlíkahald, tá lágkonjunkturur rakar búskapin. Hetta skal halda virksemisstøðinum í vinnuni uppi.

Við tølum frá Landsverki fyri samanseting av ymsum útreiðslum, sum eru partur av landsvegahaldi og partur av umvælingum av landsins bygningum, er gjørd ein meting av beinleiðis ávirkan á tørvin á arbeiðsmegi. Ein hægri játtan til útreiðslur til landsvegahald við 20 mió. kr. árliga og til at umvæla landsins bygningar við 40 mió. kr. árliga verður mett at økja eftirspurningin eftir arbeiðsmegi við gott og væl 60 ársverkum. Av hesum

verða nakað omanfyri helvtina handverkarar, stívliga ein triðingur arbeiðsfólk og upp til fimm akademikarar so sum verkfrøðingar, byggifrøðingar ella líknandi.

Umframt beinleiðis øktan eftirspurning eftir arbeiðsmegi til at fremja viðlíkahald landsins, verður eisini roknað við avleiddum virksemi, sum fer at økja eftirspurningin eftir arbeiðsmegi enn meira. Í lágkonjunkturi gevur uppraðfesting av landsins viðlíkahaldi mest avleitt virksemi, og er tá ikki órealistiskt at vænta, at avleidda virksemið kann verða út við líka stórt, sum beinleiðis uppraðfesta viðlíkahald landsins.

7. Heimildarlóg um konjunkturjavnandi uppraðfesting av landsvegahaldi og umvæling av landsins bygningum

Endamálið við lógaruppskotinum er at fremja konjunkturjavnandi átøk sum viðvirka til, at virksemisstøðið í byggivinnuni verður hildið uppi, tá arbeiðsloysið hækkar og vandi er fyri, at lágkonjunkturur er ávegis.

Tískil verður uppskot til løgtingslóg lagt fyri løgtingið, sum heimilar landsstýrismanninum, tá arbeiðsloysið triðja mánaðin á rað fer upp um 3,5%, í sama fíggjarári og komandi fíggjarlógum at uppraðfesta játtanirnar til landsvegahald við 20 mió. kr. árliga og umvæling av landsins bygningum við 40 mió. kr. árliga.

Arbeiðsloysismarkið á 3,5% er sama mark, sum er ásett í aðrari lóg, og sum ger tað lættari hjá vinnuni at fáa útlendska arbeiðsmegi, tá arbeiðsloysið fer undir 3,5%.

Við hesum konjunkturjavnandi átøkum verður møguleiki hjá byggivinnuni at hava støðugari tal av lærlingum, tí meira arbeiði verður til teirra hendur. Við hesum fæst eisini, at hond verður tikin um eftirsleipið, tá umræður landsvegahald og umvæling av landsins bygningum.

Hartil er sannlíkt, at uppraðfestingarnar til landsvegahald og umvæling av landsins bygningum við avleiddum virksemi eisini hjálpa til at halda virksemisstøðinum uppi í øðrum pørtum av vinnuni.

8. Útbjóðing av almennum arbeiðum setur krøv til fyritøkur um at útbúgva til vinnuna

Partarnir eru samdir um, at tá ið stjórnarráð og stovnar undir landinum bjóða út arbeiði í sambandi við viðlíkahald og ný- og umbygging, skal tað vera ein treyt, at fyritøkurnar, sum bjóða upp á arbeiðið, hava átikið sær at útbúgva yrkislærd.

Hetta verður gjørt á tann hátt, at Byggiharrasamtak Føroya, Føroya Handverksmeistarafelag og Ráðgevarafelag Føroya, sum longu sita í ABF 06 arbeiðsbólki, orða eitt skjal, har treytin um lærlingar verður nágreinað.

Treytin um lærlingar skal innibera, at bert fyritøkur, sum seinastu fimm árini hava útbúgvið lærlingar, kunnu bjóða upp á arbeiði við viðlíkahaldi og ný- og umbygging hjá landinum. Atlit skulu tó takast til, at fortreytirnar fyri ymsu fakøkini eru ymiskar, og at støddin á fyritøkunum er ymisk. Støða skal sostatt takast til, hvat er eitt hóskandi tal av lærlingum í mun til fakøki og stødd av fyritøkum. Nýggjar fyritøkur og útlendskar fyritøkur, sum ikki hava lærlingar, skulu í staðin lýsa, hvussu tær fara at taka ábyrgd av at útbúgva lærlingar gjøgnum arbeiðið, ið boðið verður uppá.

Tá ið treytin er nágreinað í ABF 06 arbeiðsbólkinum, verður skjalið lagt fyri partarnar, sum síðan gera avtalu um, at hetta skal vera galdandi í samband við útbjóðing av viðlíkahaldi og ný- og umbygging.

Landsstýrið ger síðan rundskriv, sum áleggur øllum stjórnarráðunum og stovnunum undir landinum at fylgja avtaluni og treytunum um at útbúgva lærlingar, tá ið arbeiðir við viðlíkahaldi og ný- og umbygging verða boðin út.

9. Lønarendurgjaldið til meistarar ísv. skúlagongd hjá lærlingum gerast konjunkturtengt

Ein av lutunum í semjuni, sum skal vera við til at økja um áhugan fyri at seta lærlingar í ringum tíðum, er at gera mun á lønarendurgjaldinum til læruplass, alt eftir hvussu búskaparligu vánirnar eru.

Lønarendurgjald er ásett í løgtingslóg nr. 94 frá 29. december 1998, §33, stk.4.

Sambært lógini kann læruplass fáa endurgoldið 75% av lønarútreiðslunum íroknað frítíðarløn fyri tað tíðarskeið, lærlingurin tekur skúlagongdina, ið hoyrir til læruna, og sum er ásett í viðkomandi útbúgvingarkunngerð.

Í hesari semju verður ásett, at umrødda lóg verður broytt soleiðis, at lønarendurgjaldið er 60% um arbeiðsloysi liggur niðanfyri 3,5% og 90% um arbeiðsloysi er omanfyri.

Lønarendurgjaldið verður ásett fyri hvønn lærusáttmála, tá ið sáttmálin verður undirskrivaður, og verður síðan støðugt alt sáttmálaskeiðið. Um miðal arbeiðsloysið seinastu seks mánaðirnar, innan sáttmálin verður undirskrivaður, hevur ligið omanfyri 3,5%, verður lønarendurgjaldið sett til 90% av lønarútreiðslunum. Hevur arbeiðsloysið fyri seinastu seks mánaðirnar hinvegin ligið undir 3,5%, verður lønarendurgjaldið sett til 60% av lønarútreiðslunum.

10. Arbeiðsgevarar stovna lærlingaráð

Arbeiðsgevarar stovna lærlingaráð undir Vinnuhúsinum. Í lærlingaráðnum sita umboð fyri ymisk yrkisgreinaøki:

- Handverk
- Merkantila økið
- Grafiska økið
- Ídnaður
- Ferðavinnu

Ráðið skal arbeiða við lærlingaøkinum burturav. Lærlingaráðið kemur at umboð arbeiðsgevarasíðuna, tá tað kemur til at tryggja eitt støðugari lærlingatal og at kunna, vegleiða og marknaðarføra yrkisútbúgvingar.

11. Felags kunning, vegleiðing og marknaðarføring av yrkisútbúgvingum

Partarnir eru samdir um at byrja eina 2 ára verkætlan, sum skal seta í verk ein platform, ið hevur til endamáls at vegleiða, kunna og marknaðarføra yrkisútbúgvingarnar og viðurskiftir kring tær. Samskipan av tiltøkum til at marknaðarføra yrkisútbúgvingarøkið er eisini partur av verkætlanini. Partarnir fíggja ein triðing hvør av hesari verkætlanini og útreiðslurnar skulu haldast undir 750 tús. kr. fyri alt verkætlanartíðarskeiðið.

Partarnir gera í felag tilmæli um, hvussu arbeiðið við vegleiðing, kunning og marknaðarføring av yrkisútbúgvingum skal skipast framyvir. Í bólkinum skulu sita umboð fyri fakfeløg, arbeiðsgevarar og skúlamyndugleikar. Yrkisdepilin er skrivari í bólkinum. Bólkurin handar sítt tilmæli 1. november 2019.

Tilmælið skal innihalda uppskot til skipan av felags kunning og svara uppá, hvar arbeiðið skal staðsetast, tøkniliga loysn og hvussu menningin, samskipanin og raksturin skal fíggjast framyvir.

Nýggja veksliskipanin í fólkaskúlalógini, sum m.a. raðfestir lærugreinina handaverk og list og vallærugreinir verður nýtt sum høvi at styrkja samstarvið millum arbeiðsgevarar, fakfeløg og skúla, eins og skúlamyndugleikar. Møgulig samstørv eru: átøk fyri lærarum, handverkslærarum og skúlavegleiðarum, samstarv um undirvísingartilfar, um praktikk, um ymiska kunning og vegleiðing um yrkisútbúgvingar.

12. Forum fyri støðugari lærlingatali

Grundarlagið undir einari reinari lærlingaskipan er, at lærlingatalið ikki fer undir 250 nýggjar sáttmálar um árið. Tá talið av nýggjum lærusáttmálum eitt ár kemur undir 300, verða serlig átøk sett í verk av pørtunum í felag fyri at tryggja, at nóg nógv fáa yrkisútbúgvingar. Tí verður nýtt forum gjørt, sum fylgir við hesum:

- Hvussu gongur sum heild við lærligatalinum.
- Hvussu er lærlingastøðan í ymisku yrkjunum – eru fak sum hava avbjóðingar, fak sum hava fráfall, hvussu er nøgdsemið í fakum og við skúla/arbeiðspláss, o.s.fr.
- Verður viðlíkahald og íløgur framt, tá arbeiðsloysi fer yvir 3,5%.
- Hvussu virka amboðini, sum eru grundarlagið undir hesari avtaluni.

Hetta forum verður mannað við 10 umboðum – trý fyri arbeiðsgevarasíðuna, trý fyri fakfelagssíðuna og trý fyri tað almenna. Formaðurin í Yrkisútbúgvingarráðnum eru bindilið til Yrkisútbúgvingarráðið. Skrivarin í Yrkisútbúgvingarráðnum er skrivari hjá foruminum.

Ongin serskild samsýning verður veitt limunum í foruminum.

Fyrsta uppgávan hjá foruminum er at gera uppskot um, hvørji átøk skulu setast í verk, tá lærlingatalið fer niður um 300.

Tripartasamstarv frameftir

Trípartasemjan um yrkisútbúgvingarøkið millum landsstýrið, arbeiðsgevarar og fakfeløgini er tann fyrsta av sínum slagi í Føroyum. Hon kann gerast byrjan til fleiri trípartasamstørv á øðrum samfelagsøkjum.

Tað kann gagna politisku skipanini, arbeiðsgevararum og fakfeløgum, um trípartasamstørv í framtíðini koma í fastu legu, har partarnir hava regluligar fundir um áleikandi mál á føroyska arbeiðsmarknaðinum.

Tað er avtalað, at næsta trípartasamráðing eftir ætlan verður seinni í ár. Tá fara landsstýrið, arbeiðsgevarar og fakfeløgini at hyggja nærri eftir, um tað ber til at finna eitt felags stev um vaksnamannalæru.

Verður hugt longur fram í tíðina er ein møguleiki, at landið saman við kommunum og vinnuni gera semju um eina langtíðar íløguætlan, sum skal virka konjunkturjavnandi.

Tórshavn 24. juni 2019

Vegna fakfeløgini:

Eli Brimsvik,
formaður Landsfelag Handverkaranna

Súni Selfoss,
formaður Starvsmannafelagið

Súni Simonsen,
formaður Føroya Handverkarafelag

Pætur Niclasen,
formaður S&K-felagið

Vegna arbeiðsgevararnar:

Bogi Jacobsen,
Føroya Arbeiðsgevarafelag

Magnus Magnussen,
Føroya Handverksmeistarafelag

Marita Rasmussen,
Stjóri hjá Føroya Arbeiðsgevarafelag

Vegna Landsstýrið:

Aksel V. Johannesen,
løgmaður

Kristina Háfoss,
landsstýriskvinna í fíggjarmálum

Hanna Jensen,
landsstýriskvinna í undirvísingarmálum

Heðin Mortensen,
landsstýrismaður í samferðslumálum

Fylgisskjal

til

trípartaavtalu millum Føroya landsstýri og Føroya Arbeiðsgevarafelag/Føroya Handverksmeistarafelag og Landsfelags Handverkaranna/Føroya Handverkarafelag/Starvsmannafelagið/S&K-felagið

Av skilhaldsgrundum verður nágreinað, at tað er ein fyritreyt fyri avtaluni, at løgtingslógaheimild er, ella fæst fyri, at útinna skyldurnar sum hitt almenna átekur sær í avtaluni.

Fær landsstýrið ikki heimild frá løgtinginum at útinna avtaluna, eru hinir partarnir leysir av avtaluni.